# ingini á høvdið



Fróði Benjaminsen hevur aftur í ár stírt HB liðnum fyrimyndarliga
Mynd: Álvur Haraldsen



Símin Hansen hevur verið avgerandi prikkurin í B71 spælinum
Mynd: Álvur Haraldsen

at stríðast um gullheiðursmerki í ár, men frágongdin av Andreas Lava Olsen hevur havt størri týdning enn víkingar vónaðu. Byrjanin var á góðari leið, men seinastu dystirnar undan summarferiuni rapaði korthusið hjá Víkingi. Teir mistu stevið í landskappingini og mistu finalusessin í steypakappingini til grannarnir úr Fuglafirði. Víkingur er heili 11 stig aftanfyri NSÍ, sum er á fyrsta plássi, so teir skulu byrja væl í seinnu hálvu, um heiðursmerki skal um hálsin aftur í ár.

## B68

Toftamenn hava havt eitt trupult kappingarár, sum hevur bjóða uppá eitt áttinda pláss og nógvar skaðar. Kappingarárið byrjaði við einum knúsandi 5-0 sigri á B71, men síðani hevur gingið ilt við at finna spæla frá í fjør fram aftur. Í fjør endaði B68 á einum fimta plássi, 12 stig aftanfyri fremsta liðið. Aftaná 14 umfør í ár, eru toftamenn longu 14 stig aftanfyri oddaliðið. Tey góðu tíðindini av Toftum eru, at Ahmed Keita og Ndenda Adama Gueye hava longt sáttmálan til endan av komandi kappingarárið.

## B71

Sandoyingar eru komnir best frá uppgávuni sum uppflytarar. Teir hava skavað sær 13 stig saman og tað eru trý fleiri enn hin uppflytarin FC Suðuroy og AB. B71 hevði á jóansøku ein gyltan møguleika at leggja sjógv millum seg og FC Suðuroy. Hevði B71 vunnið tann dystin, so vóru níggju stig á muni. B71 hevur í liðskipanirum og fremherjanum, Símin Hansen, sítt sterkasta kort. Hann hevur í ár víst sítt veruliga viðrið. Skal B71 yvirliva er avgerandi, at Símin heldur fram við góð spælinum.

## AB

AB er eitt felag í framgongd, men tað gongur einki hjá fyrsta liðnum. Felagið hevur fingið skýlið og í løtuni verður nýtt grasslíki lagt á vøllin. Men hópurin hjá fyrsta liðnum tinnist so hvørt og fyri kortum eru bæði Tórður Thomsen og Stig-Roar Søbstad farnir úr felagnum og restin av leikarunum eru farnir niður í løn orsaka av fíggjarligu støðuni í felagnum. Tað hevur bara eydnast AB at vunnið ein av teimum fyrstu 15 dystinum og tann statistikkurin skal broytast, um AB skal hava lið í bestu deildini komandi ár.

## FC Suðuroy

Suðuroyingar byrjaðu kappingina væl og lítið bendi á, at teir skuldi liggja niðast, tá fari var í summarferiu. Tað byrjaði við einum av mest spennandi dystinum í landskappingini higartil, tá FC Suðuroy vitjaði FM vinnarnir frá í fjør í Gundadali. Støðan gjørdist ein spannandi 4-4 javnleikur, har FC Suðuroy var omaná líka til 97 minuttir vóru leiktir. Mitt í kappingini megnaði teir ikki at fáa stig í seks dystum á rað og tí liggja teir niðast. Tað var av avgerandi týdningi, at teir vunnu jóansøku dystin á B71 vestri á eiðinum.

trondur@sosialurin.fo